# ítróttur

Nr. 162 • týsdagur • 27. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Nú verður skjótt álvara

**Fyrst í komandi ári skal føroyska manslandsliðið í hondbólti taka lut í EM-undankappingini, og nú kemur av álvara ferð á venjingarnar hjá liðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Landsliðsvenjarin í Hondbólti, Lars Nedergaard, hevur nú boðað frá, hvussu arbeiðssetningurin hjá hondbóltslandsliðnum verður komandi árið.

### Til Grønlands

Fyrst og fremst verða tað kropsligu venjingarnar, sum fara at vera ovarliga á skránni hjá liðnum. Ikki færri enn átta ferðir fara leikararnir at savnast teir tríggjar seinastu mánaðirnar av hesum álmanakkaárinum, og hvørja ferð er talan um annað hvørt kropsliga venjing ella sonevndar testir, har staðfestast kann, hvussu úrslitið av kropsligu venjingunum hevur verið.

Talan verður tó eisini um dystir. Ætlandi skal seinasta vikan í oktober mánaði nýtast til eina ferð til Grønlands, har vónin er at taka lut í eini kapping saman við grønlendska, norska og íslendska landsliðnum. Enn er alt ikki komið endaliga upp á pláss hesum viðvíkjandi, og sum alternativ verður nevnt, at grønlendingar undir øllum umstøðum eru áhugaðir í at spæla tríggjar venjingardystir.

Seinastu vikuna undan nýggjárinum er so ætlanin at spæla dystir móti ymsum samansettum liðum úr Føroyum, bæði »útlendskum« liði og pressuliðið, áðrenn sjálv EM-undankappingin verður á skránni fyrstu vikurnar í januar. Her eru Føroyar í bólki saman við Ísrael, Finnlandi og Belgia.

### Víðkaður hópur

Til samans hava Lars Nedergaard og hjálparmaður hansara, Hjalmar Klein Olsen, tikið út 20 mans til komandi venjingarnar. Hetta eru nakrir fleiri, enn tað annars hava verið, men tað er at fegnast um, at eitt nú teir báðir strikuspælararnir, Bárður Brimvík og Janus Einar Sørensen aftur eru í hópinum, eins og teir tríggir, Heini Bendtsen, Lars L. Black og Sveinur Justinussen hava trokað seg inn í hópin.



*Fyri tað nógva verður talan um kropsligar venjingar hjá landsliðsleikarunum komandi tíðina, men ætlandi verður eisini talan um landsdystir móti grønlendingum*

**Hópurin, sum venjararnir fara at arbeiða við komandi vikurnar sær annars soleiðis út:**

**Málverjar:**

| | |
|---|---|
| Jens Skipagøta | Team Amager |
| Lars L. Black | Kyndil |
| Johan Danielsen | Kyndil |
| Eli Müller | VÍF |

**Strikuspælarar:**

| | |
|---|---|
| Mortan Hansen | Tjaldur |
| Kristian Madsen | KÍF |
| Bárður Brimvík | H 71 |
| Janus E. Sørensen | Kyndil |

**Vongspælarar:**

| | |
|---|---|
| Hans Á. D. Christiansen | Kyndil |
| Martin Hummeland | Ajax/Farum |
| John Zachariassen | VÍF |
| Regin Petersen | KÍF |
| Heini Bendtsen | Kyndil |
| Sveinur Justinussen | StÍF |

**Bakspælarar:**

| | |
|---|---|
| Sámal Joensen | VÍF |
| Heini Joensen | DK |
| Ingi Olsen | VÍF |
| Áki Olsen | VÍF |
| Halgir Dahl-Olesen | H 71 |
| Høgni Klein | Kyndil |


Tilboðsferðir

Fráferð 13/9, aftur 17/9

30 fótbóltsferðir og 20 konsertferðir til London fyri serprís



Til fótbólt...

5.995,-

íroknað ferðaseðil, ferðaavgjald, atgongumerki, ferðing til og frá fótbóltsdysti og uppihald.

Klassikararnir Chelsea-Newcastle og Tottenham-West Ham eru krás fyri fótbóltsáhugað. Dystirnir vera leiktir ávikavist leygardagin 14/9 og sunnudagin 15/9. Mánadagin vera stundir at uppliva London.



Til sangleik...

5.995,-

íroknað ferðaseðil, ferðaavgjald, atgongumerki, ferðing til og frá sangleikinum og uppihald.

Væl fagnaði sangleikurin Mama Mia, London Eye og River Cruise á Thames. Hann hevur gingið fyri fullum húsum, og nú kann tað upplivilsi gerast títt leygardagin 14/9. Og so fært tú eisini stundir at síggja London.

Bílegging hjá Atlantic Airways.
Vit tilskila okkum rættin at avlýsa ferðirnar, um undirtøkan ikki er nóg stór.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo





Tilboðsferðir

frá Atlantic Airways



Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2165,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 10/10 og 22/10 til 9/12 2002.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 30 dagar.



Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

1479,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 9/12 2002.

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferðin skal vera hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Mortan Hansen til Íslands

**Strikuspælarin hjá Tjaldrinum er í hesum døgum í Íslandi, har hann roynir at fáa sáttmála við felag í bestu deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað eru í løtuni sannlíkindini fyri, at landsliðsvenjarin í manshondbólti, Lars Nedergaard, í næstum fer at hava enn ein hondbóltsútiseta í leikarahópi sínum.

Tá A-landsliðið í summar var á venjingarlegu, vóru føroyingar ikki teir einastu, sum fylgdu við, hvussu leikur fórst. Hjá Þór á Akureyri hava teir mist nakað av fólki frá í fjør, og tá fleiri skaðar eisini gera um seg í hópinum, nýttu teir høvi at kanna eftir, hvørt onkur leikari var at síggja, sum kundi styrkja um hópin. Valið fall á sterka strikuspælaran hjá Tjaldri, Mortan Hansen, og hann er í hesum døgum í Íslandi, har hann komandi vikuna skal royndarvenja við felagnum.

### Góðar vónir

Tá vit sunnukvøldið fingu orðið á Mortan, var tað ein móður strikuspælari, sum vit tosaðu við.

Fríggjadagin kom hann til Íslands, og longu sama kvøld var venjingardystur á skránni. Leygardagin vóru tveir dystir leiktir, og tó at hann hevði frí sunnudagin, so var eyðsæð, at møðin skuldi rindast.

Spurdur, hvussu vónirnar um ein varandi sáttmála vóru, nú hann hevði verið partur av liðnum nakrar dystir, segði Mortan, at tær mundu vera á eini leið.

- Tað er kanska ringt at meta um, men í øllum førum eri eg meira positivur nú, enn eg var undan fráferðini. Kanska hevði eg vóna, at sum strikuspælari fór eg at fáa nógvar bóltar at arbeiða við, men so er tó ikki. Íslendingar seta í nógv størri mun álit á bakspælararnar, og tað ger so spælið hjá mær nakað øðrvísi, og tað er so nakað, sum krevur tilvenjing. Men samanumtikið, so haldi eg tó, at tað hevur gingið á eini leið, og tá støðan við fólki er, sum hon er, hjá Þór við skaðum og øðrum, so kann væl vera, at eg verði verðandi her uppi, heldur hann.



*Strikuspælarin hjá Tjaldrinum, Mortan Hansen, er í løtuni í Íslandi, har hann hevur í hyggju at fáa sáttmála við Þór, sum spælir í bestu íslendsku deildini*

### Verður avgjørt í vikuni

Um sjálvt spælið, so heldur Mortan, at umframt skiftið í spælistíli, so er talan um nakað heilt annað, enn tað at spæla hondbólt í Føroyum.

- Tað sigur seg sjálvt. Íslendingar eru jú á so nógv hægri støði enn vit, tá um hondbólt ræður, so at tað er nógv harðari, sigur seg mest sum sjálvt. Serstakliga er tað leikferðin og kropsliga spælið, sum eru á nógv, nógv hægri støði, enn eg eri vanur við úr Føroyum.

Sum nevnt, so byrjaði royndartíðin hjá Mortani í nýggja felagnum fríggjakvøldið. Alla hesa vikuna verða venjingar av ymsum slag á skránni, og komandi vikuskifti verðru so ein kapping fyriskipað, har Þór eisini skal taka lut. Væntandi fer leiðslan í felagnum eftir hetta at taka støðu til, hvørt Runavíkingurin skal gerast fyrsti mansleikarin úr Føroyum, sum fer at royna seg í best íslendsku hondbóltskappingini, síðani Andreas Hansen í 1990/91 gjørdi um seg.

VB-Skála 0-0:

# Skála fekk stig

**Enn hava skálamenn fyrsta sigurin í bestu fótbóltsdeildini til góðar, men sunnudagin fingu teir eitt stig, og komu sostatt nærri eini bjarging í fótbóltstilveruni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Undir vanligum umstøðum er einki at ivast í, at vágbingar vóru stórfavorittar, tá Skála kom á vitjan sunnudagin. Vanliga eru vágbingar sera stinnir á heimavølli, og tá Skála enn ikki hevur vunnið dyst í bestu deildini, átti eingin ivi at verið um útfallið av dystinum.

Men talan hevur ikki verið um nakað vanligt fótbóltsár í Vági. Órógv á venjarasessinum hevur kostað nógv, og í landskappingini hevur leingi staðið greitt, at liðið mest sannlíkt fer at enda onkustaðni í ongamannalandi.

### Linligur dystur

Hetta var eisini sjónligt á vøllinum sunnudagin. Skála var komið til Vágs fyri í øllum førum at verja stigið, sum teir høvdu við dystarbyrjan, og tí var dystarupplegg teirra av tí heldur varliga slagnum.

Tí fekk VB rættiliga skjótt leikligu yvirvágina í dystinum, men teimum restaðu tó tað bit, sum teir so ofta hava havt á heimavølli. Leikferðin var í mangar mátar alt ov lág til veruliga at vera nøkur hóttan móti Skála, og tó at nakrir málmøguleikar stungu seg upp, so hevði Eugen Voda í Skála-málinum tamarhald á tí mesta sum kom, tó at hann einstakar ferðir noyddist at vísa síni evni sum málverji.

Beint fyri steðgin var eisini um reppið, at Skála kundi lagt seg á odda, men í evstu løtu fekk VB-verjuleikari vart fyri, tá skotstøða tók seg upp í brotsteiginum.

Í seinna hálvleiki gekst ikki stórt øðrvísi enn í fyrra. Einasta broytingin mundi vera, at nú vágbingar gjørdust alsamt greiðari um, at her fór eingin sigur at koma av sær sjálvum, so gjørdist teir alt meira tráðir í at flyta bóltin fram á Skála hálvuna. Ikki altíð við so øgiliga skilagóðum spæli, men meira við longum bóltum frameftir, sum á ongan hátt gjørdu arbeiðsuppgávuna hjá Skála torførari.

Dramatiska hæddarpunktið í dystinum mundi sostatt vera, tá Tórður Holm stutt fyri leiklok varð rikin av vølli, tá dómarin helt hann brúkt seg dekan ov nógv.

### Vónin livir

Samanumtikið var talan soleiðis um ein dyst av meira linliga slagnum, men hetta gjørdi tó ikki frøina á Skálamonnum minni, tá dysturin var lokin.

Eitt skifti hevði bonkurin annars verið vitandi um, at í Havn var TB á odda móti B36, men fyri Skála mundi tað koma væl við, at TB kortini einki fekk við sær. Nú eru bert tvey stig upp til sessin, sum inniber rættin at spæla um sessin í bestu deildini, og enn eigur Skála heimadyst á móti TB.

**Dysturin í tølum**
**VB-Skála 0-0**
Dómari: Lassin Isaksen

**VB:** Bjarni Johansen - Slobodan Madzar, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Mortan í Hørg, Palli Augustinussen, Michael í Lágabø, Marek Wierzbicki, Jón Pauli Olsen – Dan Djurhuus, Nenad Zivanovic

**Skála:** Eugen Voda – Rúni Rasmussen, Bent Djurhuus, Pauli Poulsen, Ronni Hansen Bárður Danielsen– Áki Petersen, Alexandru Gabor, Pauli Hansen, Arnhold Berg – Alexandur Johansen.

## Áki Olsen til Danmarkar



*Størsta skothóttanin hjá føroyska hondbóltslandsliðnum hevur verið nógv skaddur seinnu árini, men vónandi verður hann tøkur, tá EM-undankappingardystirnir verða á skránni í januar*

**Vestmenningurin hevur verið nógv plágaður av skaðum seinastu tíðina, og er nú hjá donskum serfrøðingini til tess at fáa bilbukt við trupulleikan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum partur av tíðindaskrivinum um hondbóltslandsliðið, hevur venjarin hjá føroyska landsliðnum boðað frá, at Áki Olsen nú fer Danmarkar at leita sær ráð, til tess at lekja drúgva knæskaðan, sum hevur plágað vestmenningin í meira enn eitt gott ár.

Talan er um eina vitjan hjá danska ítróttarlæknanum, Eilir Larsen, sum verður mettur sum avgjørt størsti serfrøðingurin innan ítróttarskaðar í Danmark, og eitt nú innan giktasjúkur telist hann millum teir fremstu í heiminum.

Tað er Lars Nedergaard sjálvur, sum hevur fingið kanningina hjá Eilifi Larsen í lag, og vónar hann, at hetta kann vera viðvirkandi til, at skotsterki bakspælarin verður tøkur, tá Føroyar í januar mánaði skulu spæla EM-undankappingardystir sínar.